

# Jarðfeingi umsókn frá Statoil at bora Brugduna

**Jan Müller**

26.01.2014 - 16:29

Oljan.fo

Um miðjan apríl er ætlanin hjá Statoil at fara undir at bora brunnin 6104/21-2, eisini nevndur Brugdan ll, lidnan. Brunnurin er í loyvisøki 006.

Áðrenn farast kann undir leitiboring eftir kolvetnum, skulu myndugleikar góðkenna ætlanina. Í hesum sambandi fekk Jarðfeingi í seinastu viku umsókn frá Statoil sum fyristøðufelag í hesum loyvinum. Høvuðsdentur í viðgerðini av eini boriumsókn er at tryggja, at virksemið verður gjørt forsvarliga við atliti til heilsu, trygd og umhvørvi. Nú farið verður aftur undir at bora henda brunnin, verður annar pallur nýttur enn seinast.

Byrjað varð at bora henda brunnin í 2012, men av tí at tað dró út at fáa brunnin liðugt boraðan, og tað gekk móti vetrartíð, varð avgjørt at steðga fyribils við boringini og taka hana upp aftur seinni.

Seinni í ár verður eftir ætlan farið undir at bora ein brunn aftrat. Hesin verður í loyvisøki 008.

Loyvishavarar í L006: Statoil er fyristøðufelag (35%), ExxonMobil (49%), OMV (15%) og Atlantic Petroleum (1%).

Kelda: Jarðfeing